# Skotar og hetlendingar vilja landa í Kollafirði



Kollafjord Pelagic tekur ímóti uppisjóvar fiski og kann bjóða eina tænastu sum stendur mát við altjóða standardir.

Foto: Jens Kristinan Vang

**Kollafjord Pelagic eru væl í gongd og rokna við at frysta 30-40.000 tons av uppisjóvar fiski í 2005; í næstum fara væntandi eisini skotar og hetlendingar at landa har**

PELAGISKT

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Síðani august mánað hevur vinnuligur rakstur verið á Kollafjord Pelagic. Talan er um innfrysting av gullaksi, sild, makreli og seinni møguliga øðrum uppisjóvar fiski. Higartil hava fleiri føroysk skip landað sína pelagisku veiði hjá Kollafjord Pelagic, men sambært stjóran Sofus Poulsen eru góðar vónir um at eisini útlendsk skip í næstum fara at landa har.

»Síðani august hava nøkur føroysk skip landað hjá okkum, men eg rokni eisini við at síggja skotar og hetlendingar í næstum,« segði Sofus Poulsen.

»Vit hava góð sambond við bæði føroysk og útlendsk reiðarí, og makrelurin ferðast vanliga úr norskum øki suðureftir í bretskan sjógv og so vestureftir. Hetlendingar og skotar hava nú fingið at vita at Kollafjord Pelagic er komið ígongd og at vit taka ímóti fiski nú.«

Tann drúgvi uppstarturin hjá Kollafjord Pelagic, við norskum maskinum ið ongantíð fingust at rigga og einum veitara ið fór á heysin, fekk eina nýggja vend tá tann upprunaligi eigarin, tann hollendski frystigoymslu veitarin Kloosterboer, misti tolið við tí tungu byrjanini. Kloosterboer gjørdi ikki vandari enn at avskriva sínar íløgur fyri at bjóða føroyingum at keypa Kollafjord Pelagic fyri ta fígging sum virkið stóð í, nevniliga 60 milliónir krónur hjá Føroya Sparikassa. Av tí at hollendingarnir høvdu offrað einar 100 milliónir upp á verkætlanina, kann tað uttan iva síggjast sum eitt gott keyp hjá teimum ið tóku av tilboðnum; tá ein nýggj konstruktión fyrilá fyri einum ári síðani, vóru eigararnir Føroya Sparikassi og Notio, við umleið einum triðingi hvør, og so Trygginarfelagið Føroyar, Varðin, Driftin og EM Shipping, við einum góðum triðingi tilsamans.

Eitt tað fyrsta teir nýggju eigararnir gjørdu var at hækka partapeningin við 31 milliónum fyri síðani at lata felagið keypa eina íslendska frystiskipan fyri einar 30 milliónir. Talan er um ein sokallaðan frystitunnil sum kann frysta niður 400 tons um samdøgrið.

»Frystiskipanin klárar 200 tons í senn og niðurfrystingin tekur 12 tímar,« greiddi Sofus Poulsen frá.

Hvat ið skal henda við tí gomlu útgerðini úr Noreg, er tó ein opin spurningur.

»Tann defekta gamla skipanin stendur framvegis og spurningurin er hvat vit skulu gera við hana; fyribils ætla vit ikki at gera tað stóra við hana.«

Frystihotellið hjá Kloosterboer, beint við síðuna av Kollafjord Pelagic, er ein góður samstarvsfelagi. Tað mesta av tí sum verður fryst, fer yvir til Kloosterboer at standa til tað einaferð verður útbókað.

»Fiskurin fer beinleiðis úr frystitunlinum í eina pakkiskipan og haðani verður hann so fluttur við trukki yvir til frystigoymsluna hjá Kloosterboer, um ikki onnur avtala fyriliggur. Hetta er ein ógvuliga smidlig mannagongd ið gevur eina integreraða skipan við góðum yvirsýni.«

Við ávísing til óstøðugar prísir á makreli og øðrum pelagiskum fiski, er stjórin á Kollafjord Pelagic varin tá vit spyrja hann hvat umsetningurin hjá virkinum væntandi verður í 2005.

»Vónandi klára vit eini 30-40.000 tons, men hvussu nógv tað verður í krónum og oyrum, tað veldst jú um prísirnar.«







